## DAGSINS MEINING

# Eingin vil eiga nakað í blokkstuðulsskipanini

Sambandsflokkurin leingist eftir teimum gomlu døgunum við refusiónsskipanini og førir fram, at loysingarkreftirnar í Føroyum innførdu blokkin. Hetta er ikki heilt rætt, tí tað var eitt generelt rák, eisini í Danmark, móti blokkstuðulsskipanum, heldur enn refusión frá statinum.

Tjóðveldisflokkurin tosar sum um, at blokkstuðulsskipanin hevur verið í gildi síðan 1948. Hetta er ikki í tráð við veruleikan, har blokkstuðulsskipanin ikki hevur verið í kraft í meiri enn 13 ár, eftir at verða innførd við Javnaðarflokkinum og Tjóðveldisflokkinum á odda. Tá var hetta útrópt sum eitt stórt stig á sjálvstýrisleið av Tjóðveldisflokkinum. Nú er tøgn og partur av ungdóminum veit ikki av, at Tjóðveldislfokkurin fyri fáum árum síðani var við til at innføra blokkstuðulsskipanina. Tøgnin er, tí hetta samsvarar ikki við søguuppfatanina hjá nýggja ættarliðnum í Tjóðveldisflokkinum sum tvíheldur um, at føroyingar eru gjørdir meira og meira heftir av donskum studingi, hóast hetta ikki er rætt. Føroyingar eru í dag minni heftir av donskum pengum, enn undir refusiónsskipanini.

Hví hava bæði Sambandsflokkurin og Tjóðveldisflokkurin so nógv ímóti blokkstuðulsskipanini. Hjá Sambandsflokkinum er tað einfalt tað, at man ivast í førleikanum hjá føroyskum politikarum at stýra sær sjálvum og landskassanum. Hjá Tjóðveldisflokkinum er tað avnoktan av tí hóvliga sjálvbjargnispolitikkinum, ið Javnaðarflokkurin og Tjóðveldisflokkurin stóðu fyri í sjeyti og áttatiárunum, hóast hesin er fleiri bátslongdir frammanfyri núverandi samgongu í úrslitum. Man nevnir einki um tað og letur sum um, at einki er hent á hesum øki í 50 ár – og tíverri sær tað út sum, at partur av ungdóminum ikki veit betur enn tað sum tjóðveldisleiðslan sigur, og tí sær út sum, at tað fyrr so tætta samstarvið millum vinstraflokkarnir Tjóðveldisflokkin og Javnaðarflokkin er farið í søguna.

Tað skal vera okkara vón, at bæði Sambandsflokkurin og Tjóðveldisflokkurin trekkja móti miðjuni, og sleppa dogmatisku holdningunum og at Tjóðveldisflokkurin gevst at ignorera søgulig fakta. At vísa ábyrgd sum flokkur merkir eisini at standa við sínum gerðum og í løtuni støkka teir undan øllum gerðum áðrenn 1998. Um núverandi Tjóðveldisleiðsla einki vil eiga í Tjóðveldispolitikki í sjeyti-, áttati- og fyrst í nítiárunum, so burdu teir sagt tað alment ella stovna nýggjan flokk, tí Tjóðveldisflokkuri var aktivur í politikki millum 1948 og 1998 og var við til at menna hetta samfelag - hann hevði t.d. landstýrismannin í fíggjarmálum longst í 80'unum.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Viðmerking til Absalon Absalonsen

**Alma Fossá**

Fyrr var hildið, at tað at vera samkyntur, var bæði synd og skomm, skrivar tú.

Tí hevur tú rætt í.

MEN nú á døgum eru nógv tíbetur blivin klókari. (men nokk ikki øll!!!!!!!!)

Tú dregur parallellir, har ongir parallellir eru:

Mordari og tjóvur setur tú parallelt við samkynt!!!?

Hvat í verðini SKAÐAR TAÐ TEG, at onkur er samkyndur?

IKKI TAÐ SUM EITUR!

Ein pædofilur skaðar síni offur.

Ein mordari kann myrða teg.

Ein tjóvur kann stjala frá tær.

Ein samkyntur er góður við eitt annað menniskja, sum EISINI er samkynt.

Tað kann aldri vera synd.

Um hetta var einasta "synd" her í verðini, so var væl vorðið.

# Samferðslan í Norðoyggjum á sjógvi og landi

**Jógvan Páll Poulsen**
*valevni Javnaðarfloksins í Norðoyggjum*



Tað verður sagt, at alt kann ikki gerast í senn, og at man ikki blívur liðugur at byggja land, og satt er tað.

Innan samferðslu her í Norðoyggjum má sannast, at hetta økið er rættuliga niðurslitið og gamalt. Taka vit tunnlarnar norður um fjall, sum vóru gjørdir fyri 35 árum síðani, so sigur tað seg sjálvt, at teir ikki passa til ferðsluna í dag. Tá vit so um ikki so langa tíð blíva bundnir uppí miðøkið við Norðoyatunlinum, er grund til at stúra. Her má farast í gongd beinanvegin.

Taka vit so Viðareiðisvegin. Fyri 4 árum síðani var Viðareiði avstongt sum ein onnur útoyggj. Tað er óneyðugt at forklára um farleiðina, sum hon er nú. Har eigur ein tunnil at vera gjørdur.

Fara vit so til Barsskor, sum stundar móti 100 skjótt. Tað skuldi ikki verið neyðugt at komið við nakrari frágreiðing um hann.

So er tað Másin, hann er yvir 40 ár og kann heldur ikki geva fólki tað service, sum fólk hava krav uppá ídag. Ein tunnil vestur um á Svínoynni kemur at bera við sær, at Svínoy ikki longur verur ein útoyggj, og tað sama við eini nýggjari ferju kemur at gera tað nógv lættari at búgva í Svínoy.

Sitandi samgonga hevur ikki sett eitt oyra av til nakað av hesum, sum eg her havi nevnt. Okkurt er komið á ein lista, sum teir hava gjørt. Har hava teir raðfest, hvat skal gerast. Samgongan heldur ikki, at tað hastar við nøkrum av hesum. Teir siga, vit hava ikki brúk fyri hasum nú. Í ár hava teir sent 366 mió niður aftur til Danmark, tí vit hava ikki brúk fyri teimum. Øll norðoyaumboð í sitandi samgongu tóku undir við hesum. Gott val

# Bíggjarkórið konsert í Bíggjar- og í Sandavágs kirkju

TÍÐINDASKRIV

Nakað fyri seinastu jól savnaðust fólk í Bø at vita, um tað mundi bera til at fáa í lag eitt kór at syngja jólasálmar í kirkjuni sunnudagin millum jól og nýggjár.

Tiltakið var so væleydnað, at fólk fingu hug at hittast aftur nakrar ferðir til framhaldandi kórsang. Og nú sunnudagin 28. apríl, bjóðar kórið til konsert í Bíggjar Kirkju kl.17.00, sum verður endurtikin í Sandavágs Kirkju kl. 19.30.

Á skránni eru sálmar, føðilandssangir og vársangir, nakrir norðurlendskir kórsangir og onkur altjóða kirkjukórsatsur frá eldri tíð.

## Valtilfar í Sosialinum

Treytir fyri upptøku av valgreinum er, at tilfarið verður latið okkum sum teldupostur ella á diskli. Prísurin er hálvur lýsingarprísur.

Fyri valgreinar á valsíðuni í Internet-Sosialinum er prísurin 50 kr fyri hvørja grein, um ikki onnur avtala er gjørd við flokkarnar.

*Sosialurin*


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14⁰⁰

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VALGREINAR

# Tjóðveldis visión 4 »Ein discount skipaðan skúla«

**Eyðólv Dimon**
*Valevnið Javnaðarfloksins í Suðurstreymoy*



Mín meining er, at ein føroysk skipan eigur at verða hin besta skipanin. Men í Valtinginum mánakvøldið tvingaðu spyrjararnir fleiri ferðir Tjóðveldisumboðini út úr skýmaskotunum at svara, hvat Tjóðveldisflokkurin leggur í orðingina ein føroyskan skúla. Og tað var skelkandi at hoyra, at ein føroyskur skúli á Tjóðveldismáli einans merkir ein bíligari skúli. Ein discount loysn. Flokkurin, sum í løtuni fyllir bløðini við lýsingum um visión 1, visión 2, visión 3 o.s.fr. hevði als onga meining um, hvussu innihaldið í føroyska skúlanum skuldi skipast. Spurd, hvat fór at broytast í fólkaskúlanum, nú hann var blivin serføroyskur, so var ongin visión, ongin vitan og ongin v.… Kritikkurin av fólkaskúlanum var, at hann var eitt kopi av tí danska skúlanum, sum var skipaður til 5 mio. fólk, og tí hildu Tjóðveldis umboðini, at man kundi fremja sparingar innan leiðsluna. Mundi hetta vera visión 4 ? Visión 3 var, at røktarheimspláss skuldi vera ein rættur, men tá Javnaðarflokkurin í síni valskrá sigur, at byggjast skulu 160 røktarheimspláss komandi fýra árini, so ávarar Tjóðveldisflokkurin móti hesi ætlan, sum teir siga er at tøma landskassan. Javnaðarflokkurin hevur sett sær fyri at nøkta tann akutta tørvin á røktarheimsplássum komandi 4 árini, og tað fer at kosta landskassanum 20 mio. hvørt ár. Hetta eigur landskassin at hava ráð til.

**Ongin visión, vitan, vælferð ella virksemi**

Valskráin FÒLKIÐ FYRST fer í ár at kosta 47 mio.kr. netto fyri landskassan, og landskassin hevur fyrsta kvartal fingið 53 mio.kr. í meirinntøku enn budgetterað er við á fíggjarlógini. So bara her eru 6 mio. kr. meiri enn FÓLKIÐ FYRST fer at kosta í inniverandi ári. Harafturat kundi verði skoytt uppí, at 2005, sum er tað dýrasta árið, tá fer valskráin at kosta 116 mio. kr. netto fyri landskassan. Hetta verður ikki tað, sum fer at sláa beinini undan ætlanunum um ein sjálvberandi búskap, men tað fer ein discount fólkaskúli hin vegin at gera. Um okkara útbúgvingar ikki eru fult á hædd við tær í okkara grannalondum so fýkur okkara kappingarføri. Tá verður ongin visión, lítil vitan, ongin vælferð og ógvuliga avmarkað virksemi. Hetta eigur veljarin at hava í huga 30.apríl.

# Ungdómur og dirvi

**Karsten Hansen**
*Valevni hjá Tjóðveldisflokkinum*



Avbjóðingin til tín, ungi veljari, hevur neyvan verið størri í nýggjari tíð enn nú. Fyrst upplivdi tú barnaárini í 8o'unum, har nærum ongi mørk vóru. Síðani kom kreppan í 90'unum, tá brádliga alt steðgaði upp, og torført var at fáa eyga á glottarnar.

Men nú seinastu árini er samfelagsgongdin av álvara vend, og búskapurin hevur við verandi stýring eina trygga gongd.

Nógvur peningur er uppspardur, fyri at vit ikki aftur skulu koma í somu støðu vegna manglandi stýring av samfelagnum. Avbjóðingin til tín, ungi veljari, er tí stór. Velur tú tryggu gongdina, ella keypir tú ein lutaseðil?

Tjóðveldisflokkurin veit, at ungdómurin er framtíðin. Hugsað tær at byrja vaksnamannalívið við at seta Føroyar á heimskortið sum ein fræls tjóð. Hugsað tær at taka tað ábyrgd á teg, sum fjøldin av føroyingum hevur runnið undan, samfelagnum og ikki minst teimum ungu til bága. Gloym ikki, at frælsið er sjálvt lívið.

Dirvi hoyrur ungdóminum til.

Kenn ábyrgd, set ein sterkan Tjóðveldisflokk á ting. Hann tryggjar tær virðilig kor her á landi við fjøltáttaðum lestrartilboðum og møguleikum annars at mennast - fyri síðan at taka við ábyrgd í egnum landi.

# Veganetið í Eysturoynni

**Sámal Petur í Grund**
*landsstýrismaður*



Sum ein teirra, sum hevur umboðað Eysturoynna í politikki seinastu 7 árini, kann eg ikki annað enn fegnast um, at tað hevur borið okkum til at útbygt veganetið í Eysturoynni.

Gott og væl 3 ár sum landsstýrismaður í samferðslumálum, knapt 3 ár í løgtingsins fíggjarnevnd og síðani sum landsstýrismaður í Almanna- og heilsumálum hava gjørt tað møguligt at vera aktivt við í hesum avgerðum.

Høvuðsveganetið er nú nærum komið undir land. Tó restar nógv arbeiði at gera, so at Eysturoyggin kann sigast at vera dagførd, hvat veganetinum viðvíkir.

Vegurin oman av Gøtueiði, rundkoyring á Skipaneskrossinum og vegurin harfrá norður í Ánirnar er nakað av tí, sum nú verður gjørt.

Á vegastrekkinum Skála - Strendur fer stór útbygging fram, og er játtan til at gera tann partin lidnan fingin til vega. So er eftir at gera vegastrekkini av Fjarðavegnum framvið Skálabotn og Strendur - Selatrað.

Á eystara armi av Skálafjørðinum og út á víkirnar eystantil eru nøkur arbeiði, sum mugu takast við í komandi valskeiði. Vegurin út á Nes. Partar av vegnum av Mýrum til Æðuvíkar. Rituvíksvegurin, sum hevur ligið sum ein skomm fyri politiska systemið í nógv ár, má gerast uppá ein ella annan máta. Vegurin av Lambareiði oman til brúnna niðri í bygdini má eisini gerast í komandi valskeiði.

Í Sundalagnum er helst strekkið frá Shellstøðini og út á Oyri tann mest átrokandi íløgan, og má hon verða gjørd í komandi valskeiði.

Tilkoyringarnar til Hellur og Oyndarfjørður eru eisini millum tey arbeiði, sum eiga at gerast í komandi valskeiði.

Tit, sum ynskja nakað gjørt við hesi viðurskifti, áttu at samla tykkum um Sjálvstýrisflokkin, so at styrki okkara verður til at útføra hesi arbeiði.

X við lista D.

# Fiskaúrdráttir & biotøkni kunnu tvífalda útflutningvirðið

**Roar Heini Olsen**
*Valevni fyri Sjálvstýrisflokkin í Suðurstreymoy*



Útbúgving, gransking og menning eru horna steinar undir samfelagsmenningini og einum framtíðar sjálvberandi búskapi. Her verður bert nortið við tann partin, ið er næstur, mest átroðkandi og sum skjótast kann setast í verk. Tað merkir ikki, at vit ikki skulu leggja dent á onnur øki eisini.

Í kontrolleraða atmosferu ber nú til at flyta fisk hinumegin jørðina, har ein milliard kinverjar standa klárir at flakaskera fiskin fyri 1 kr. um tíman. Setir tú bann fyri at útflyta fiskin ótilvirkaðan, verður tú í longdini ikki kappingarførur. Eina tíð kunnu vit halda uppá fiskaarbeiðið við at royna at tryggja dygd og støðugar leveransur, men lítla rávørugrundarlagið og óstøðug veðurlíkindi hjálpa ikki væl til hetta. Umframt at vit skjótast gjørligt eiga at fara undir aling av toski og møguliga øðrum sløgum, sum kunnu tryggja støðugari rávørutilgongd, liggur stóra avbjóðingin tí í at menna vitan innan biotøkni og harvið møguleikarnar at gagnnýta skræðu, sil, rogn, innvølir, avskurð osfr. Sambært serfrøðingum ber innan 10-20 ár til at vinna eins nógv - kanska meira - burtur úr hesum, enn úr sjálvum fløkunum, um vit veruliga satsa munandi á hesum øki.

Í fjør vitjaði ein kalva- og toskaalari úr New Foundlandi hendavegin, sum longu tá vann _ dollara fyri úrdráttir av fiskaleivdum, hvørja ferð hann seldi toskafløk fyri 1 dollara. Hevði hann í størri mun útvunnið úrdráttir til heilsukost, smyrsl og medisinalvørur, hevði inntøkan av fiskaleivdum helst farið framum fløkini. Bert við at satsa nógv uppá hetta øki kunnu føroyingar gera sær vón um eisini at varðveita ein munandi part av vanliga fiskaarbeiðinum her á landi. Men, tað hendir ikki av sær sjálvum.

Á ráðstevnu um evnið í Norðurlandahúsinum í fjør var niðurstøðan, at vinnan við at gera strategisk samstørv tvørtur um landamørk skuldi koma sær inn í hesa nýggju tøkni. Hetta er neyðugt, m.a. tí at teir úrdráttir, ið kasta mest av sær, kosmetiskar og medisinalar vørur, kosta sera nógv at menna. Men hóast fyrilestrahaldararnir, ið hava drúgvar royndir innan økið, ferð eftir ferð undirstrikaðu, at tú má lata nakað fyri at fáa nakað, varð einki tosað um at leggja dent á førleikamenning við at seta pening av til útbúgving og gransking innan økið í Føroyum. Her eru vit føroyingar alt ov bláoygdir, tað má einki kosta og vit vænta okkum alt fyri einki. Hetta er sparing eftir reyv, tí tá er vandi fyri, at vit uttan vitan innanífrá bert hava rávøruna at lata og harvið enda sum berir rávøruútvegarar til útlendsku fyritøkurnar, sum fara við meginpartin av virðisøkingini av vitanini, ið verður løgd í framleiðsluna. Vit skulu samstarva tvørtur um landamørk, men lat okkum her eins og í tí Ríkisrættarliga spurninginum syrgja fyri í minsta lagið at gerast líkaverdugir samstarvsfelagar m.a. við at økja okkara vitan innanífrá við at tryggja hollar útbúgvingar-, menningar og granskingarmøguleikar.

Brúkið høvdið, veljið við hjartanum!